VIÐMERKINGAR

Mítt høvur á eitt fat



Eyðun Andreassen

Tá fólk lata seg velja í eina almenna nevnd, gerast tey almennir persónar í tí høpi, sum hevur við nevndina og virki hennara at gera. Tað er ótolandi og forkastiligt, sum tíverri ofta hendir í Føroyum, at privat viðurskifti verða drigin upp í eitt slíkt kjak.

Í kjakinum um teir nývaldu limirnar í vísindaliga siðsemisnevndini eru fleiri tílík viðurskifti tikin fram. Í hesum førinum er tó tað hent, at tey eru útvald nettupp fyri sína støðu í viðurskiftum, sum annars áttu at verið óviðkomandi og ikki á nakran hátt áttu at verið viðgjørd alment.

Bill Justinussen sigur heilt greitt og klárt í fjølmiðlunum, at slík viðurskifti hava verið avgerðandi fyri hann, tá hann valdi nevndarlimirnar í vísindaligu siðsemisnevndina, og tí hevur kjakið fingið ta vend, tað hevur. "Eg havi valt fólk, eg havi álit á," sigur hann í viðtali í Sosialinum 11. september. Tað er í lagi, men so sigur hann víðari, at nevndin fyrst og fremst er ein nevnd, ið skal ráðgeva landsstýrismanninum, og at tað "er lættari hjá mær at velja fólk, eg kenni heldur enn fólk, eg einki veit um." Í kjakinum á løgtingi segði hann tó, at hann ikki kendi tey. Hvørjum skal ein trúgva? Og í sama viðtali í Sosialinum "dylur hann ikki fyri, at hann hevur hugsað um at velja nevndarlimir, ið draga somu línu sum hann í slíkum málum." Hvat hetta er fyri lína, kemur síðani fram í viðtalinum: "Høvdu vit ein landsstýrismann, ið hevði ógvuliga frælslyntar hugsjónir, hevði hann óivað eisini mannað nevndina við fólkum, sum stuðlaðu hansara sjónarmiðum, heldur Bill JustinuAssen." Tí ivist eg í, nettupp um hann var frælslyntur.

Heilir tríggir prestar, tveir av teimum sóknarprestar í Klaksvík, hin tríði fráfarin prestur í Fuglafirði, ein trúboðari og ein starvsmaður og politiskur ráðgevi hjá løgmálaráðharranum og fólkatingsmanninum hjá Tjóðveldisflokkinum hava tikið til orðanna. Umframt onnur. Alt um at eg blandi privat viðurskifti hjá nývaldu nevndarlimunum uppí.

Tað er ikki eg, sum havi gjørt tað! Sjónarmiðini hjá Miðflokkinum eru kend, og her sigur Bill, at nývaldu limirnir í siðsemisnevndini hava somu sjónarmið. Hví spyrja tit tá, sum kjakast, hvussu eg kann vita, hvat hesi fólk hugsaði? Tað er tí, at landstýrismaðurin hevur sagt mær tað! Og hartil at tey eru vald lutvíst ella kanska mest fyri at hava júst hesi sjónarmiðini.

Á ein hátt haldi eg, tað er synd fyri teir valdu limirnar. Eg giti mær til, at teir hvør í sínum lagi hava fingið fyrispurning ella áheitan, kanska frá landsstýrismanninum persónliga ella onkrum í umsitingini, um at sita í hesi nevnd. Teir hava játtað, tí hetta tykist teimum at vera eitt áhugavert arbeiði, og hava so ikki hugsað meira um tað. Eg kann hugsa mær, at tey ikki hava grunað, at tey eru bíðin í nevndina, tí tey hava privatar áskoðanir, ið hóva landsstýrismanninum, men tí tey fakliga ella á annan hátt eru skikkað. Tey eru tí uttan at vilja tað endað í eini støðu, ið ikki er heilt góð at koma í. Satt at siga haldi eg eisini, at tey øll, hvør í sínum lagi, kunna sita í nevndini. Trupulleikin er samansetingin av nevndini. Ikki teir einstøku limirnir.

Og tí skrivaði eg mína viðmerking. Tí tað er forkastiligt, at velja limir í eina vísindaliga siðsemisnevnd eftir, hvørjar áskoðanir tey hava privat á økjum, sum í stóran mun eru relevant fyri arbeiðið í nevndini.

Visti Bill yvirhøvur, hvat tað var fyri nevnd, hann valdi limir í? Vísindaliga siðsemisnevndin skal ikki ráðgeva landsstýrismanninum fyrst og fremst. Har fór hann skeivur, men hevur vist rættað tað síðani.

Nevndin skal fyrst og fremst taka nakrar sera týðandi avgerðir um innan ávís granskingarøki. Tí helt eg tað vera upp á sítt pláss, ja mína skyldu sum formaður í Granskingarráðnum, at føra hesi sjónarmið fram. Og Granskingarráðið er í mun til Siðsemisnevndina, nettupp ein nevnd, ið skal ráðgeva landsstýrinum. Eg vildi ávarða ímóti tí, at meirilutin í nevndini varð samansettur á religiøsum grundarlag. Og enntá á víðgongdum og trongum religiøsum grundarlag. Tí Miðflokkurin er ein flokkur við víðgongdum religiøsum grundarlag. Eg lurti javnan eftir Lindini, har mangur álitismaður í Miðflokkinum er at hoyra!

Prentsvertan var valla turr, so kom róp í. Fyrst reistist ein ond eftir havinum, men hon var veik og fór framvið. Tað var Símun Absalonsen. Hann rak tó fram undir, at eg forfylgi minnilutum. Tað geri eg vissuliga ikki, men av tí, at hansara grein snúði seg mest um viðurskifti uttan fyri evnið, helt eg best vera at lata fara. Onkursvegna grunaði eg tó, at okkurt fór at koma aftrat. Og so varð. Tann lítla ondin hevur eftir eini stuttari viku reist seg til storm, ið til hesa løtu er harðnaður so mikið, at høvdið á mær verður kravt serverað á fati. Kanska kemur meira!

Sjúrður Skaale krevur - ikki í blaðgrein ella lesarabrævi, men í sjálvari oddagreinini í Fregnum - at eg skal skal koyrast frá sum formaður í Granskingarráðnum! Meinar hann tað, skuldi tað verið ein smøl søk hjá so máttmiklum manni. Hann kann venda sær til Høgna Hoydal, løgmálaráðharra, sum hann í fleiri ár hevur verið politiskur ráðgevi hjá, at fáa hetta gjørt. Eg gitið, at hann framvegis hevur gott samband har, og kanska framvegis verður konsulteraður. Ella hann kann venda sær til Torbjørn Jacobsen, ið er fólkatingsmaður og løgtingsmaður hjá Tjóðveldisflokkinum. Eg veit ikki betur enn at Sjúrður er skrivari og ráðgevi Torbjørns. Og endiliga kann hann jú venda sær til enn ein Tjóðveldispolitikara: Annliss Bjarkhamar, landsstýrismann í granskingarmálum. Tað er hon, ið setur og loysir mig úr hesum sessi mínum.

Eg havi eisini eitt borgarligt alment starv sum lærari á Fróðskaparsetrinum. Eftir lógini er tað eitt sindur truplari at koyra ein lærara frá, men hvat við at seta ein sensor, ið kann vera inni, tá eg havi undirvísing, at ansa eftir, at eg einki skeivt sigi. Ella nakað óhóskandi! Sjúrður Skaale hevur fleiri møguleikar at fáa sínar ætlanir framdar!

At teir báðir pastores loci í Klaksvík geva einum sóknarbarni sítt besta viðmæli, er sum tað eigur. Men at kunngera í bløðunum, hvussu ofta klaksvíkingar ganga til altars, tað haldi eg vera ósømiligt.

Tá er tað stuttligari at lesa Olofsen. Hann hevur jú humor. Og so dugir hann nógv fín orð og hartil kunstin at citera á latíni. Ikki vánaligt! Tað dugdi ein ávísur Rasmus Bjerg eisini. Spell bert, at tað ikki erÁ Per Degn, hann tosar við. Ein annar kann eisini tann kunstin, tá tað krevst, og má sanna vísdómin hjá tí gamla rómverksa grammaticus Terentianus Maurus: Pro captu lectoris, habent sua fata libelli! Hóast dagbløð ikki vóru til á hansara døgum, munna orð hansara eisini galda fyri eina litla blaðgrein hjá einum formanni í Granskingarráðnum!

PS! Í fyrru grein míni kom eg kanska at gera teimum víðgongdu órætt viðvíkjandi Galilei. Pávakirkjan hevur tikið ákærur sínar og grundgevingar aftur móti vísindamanninum, ið argumenteraði fyri eini heliosentriskari heimsmynd. Eftir drúgva nevndarviðgerð kundi Jóannes Páll II pávi gera hetta í hátíðarligari kunngerð longu í 1992! Sig so tað!

PPS! Kona mín, ið hevur lisið hetta, og ikki dugir latín og sum annars ikki er samd við mær í øllum lutum, biður meg vælsignaðan umseta Terentianus Maurus fyri sær (og øllum hinum mongu, ið ikki lesa latín). Tað geri eg fegin.

Bókanna lagna verður avgjørd av lesarans evnum at skilja!

Løgtingið má verað samt um stórmálini. (1)

Edmund Joensen

Sjálvt um okkara politiska skipan í høvuheitum byggir á, at sitandi meirlutin ræður, so er ikki rúm fyri politiskum sjáldrátti í stórmálum og grundleggjandi málum sum til dømis,

- trygdar- og verjupolitikki,
- uttanríkis- og handilspolitikki,
- stovnsrøkt og fiskidagaskipan og
- heildarpolitikki fyri fiskiskap á fjarleiðum.

Her snýr tað seg í høvuðsheitum um trygdina og lívsgrudarlagið hjá allari føroysku tjóðini. Ábyrgdin fyri at rætti politikkurin verður førdur, er onga aðrastaðni enn í Føroyum. Hetta er bæði galdandi fyri mál sum eru yvirtikin og í felagsmálum.

Tí krevst í hesum málum ein breið semja millum flestu flokkar á tingi, bæði úr samgongu og andstøðu.

Trygdar- og verjupolitikkur - Tvinnir eru vegirnir

Føroyingar kunnu halda fram við at gera sum nú, stinga høvdið í sandin sum strutsurin og skylda uppá Danmark, fyri síðani, tá ið nóg nógv ár eru gingin, at brúka skattaborgarans pening, at kanna hvat tað var sum hendi.

Ella brúka hin sjálvsagda møguleikan, sum tað sømir seg røttum kvinnum og monnum, at luttaka við opnum sinni sum partur av skipanini, og taka ta ábyrgd, sum krevst av okkum føroyingum.

Trygar- og verjupolitikk má breið semja vera um í løgtinginum.

Í hinum Norðurlondunum og í londunum í okkara parti av heiminum yvirhøvur er vanligt, at breið semja er um trygdar- og verjupolitikkin. Hesi lond hava fyri langari tíð síðani ásannað, at veruliga trygdin í okkara fría parti av heiminum hongur neyvt saman við politiskum stabiliteti í sjálvum londunum og í samarbeiði millum londini (til dømis í verjufelagskapum sum til dømis NATO).

Føroyar hava fyri neyðini at taka í egnan barm og broyta sín "vilja onki gera ella vita-politikk", fyri so aftaná at noyðast at kanna hvat fram er fari.- Vit hava dømini, Svørtubók, hernaðarkannning eystanfyri o.s.f., umframt ta mistonkiliggerðan sum kemur hesum í kjalarvørrinum. Hetta er samanlagt ein óforsvarlig og mannminkandi støða at hava.

Føroya løgting eigur at broyta sín politikk alt fyri eitt, soleiðis at Føroyar í framtíðini luttaka eftir førimuni, og eisini skulu føroyingar sjálvandi hava neyðugt innlit.

Tingini henda kortini

Tað liva enn føroyingar, sum minnast fyrra heimsbardaga. Nógv fleiri minnast seinna heimsbardaga. Uppaftur fleiri føroyingar minnast kalda kríggið.

Føroyingar vóru mitt í øllum hesum orrustunum. Í fyrra heimsbardaga mistu vit fólk og í seinna heimsbardaga mistu Føroyar eftir fólkatalið uppá eins líka nógv mannalív, sum tey londini, sum beinleiðis vóru í kríggi. Kalda kríggið kundi lættliga enda við kjarnorku-ørskapi har fáur ella ongin slapp undan vanlukkuni.

Tað sum fram er farið í heiminum prógvar til fulnar, at ikki ber til at standa uttanfyri og rokna við av teirri grund, ikki at verða raktur.

Annað er, at vit føroyingar eiga sjálvand eisini at taka okkara part av ábyrgdini fyri, at friður kann valda í heiminum. Okkara íkast skal ikki liggja eftir.

Tað er tí uppá hægstu tíð, at løgtingið í breiðari semju, har minst tríggir av teimum fýra stóru flokkunum eru við, broytir sín. "vilja onki gera ella vita-politikk" við ein lutakandi politikk eftir førimuni, har vit vita og virka saman við Danmark.

Tað er í dag eitt altjóða rák fyri einum sameindum heimi. Onki framkomið land kan loyva sær at standa uttanfyri trygdar- og verjupolitikk. Onki land kann kalla seg framkomið heldur, sum loyvur sær at skifta verju og trygdarpolitikk hvørja fer val er.

Her eru vit eisini við sjálva kjarnuna, nevniliga verjuna av demukratiðinum, tí dýrabærasta, og verjuna av frælsinum hjá tí einstaka í heimsamfelagnum.

(Her er bert nortið við Trygdar og verju politik, ætlanin er at koma inná hini málini seinni).

Húsaprísirnir ein trupulleiki fyri Havnina

Í meðal verða sethús seld fyri tað dupulta í Havn, samanborið við restina av landinum. Hetta er ein trupulleiki hjá høvuðsstaðnum, tí fólk í fleiri starvsbólkum við lág- og meðalinntøkum, millum annað lærarar, hava trupult við at seta føtur undir egið borð í Havn, og velja tí at flyta úr høvuðsstaðnum at búgva og arbeiða, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag

Høgu sethúsaprísirnir í høvuðsstaðnum gera tað trupult hjá fólki við lág- og meðalinntøkum at seta seg í búgv í Havn, metir Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag. Hon vísir á, at fleiri lærarar velja at søkja starv og búseta seg uttan fyri høvuðsstaðin, tí nógvir pengar eru at spara

HÚSAPRÍSIR
Jón Brian Hvidtfeldt

Høgu sethúsaprísirnir og sera avmarkaðu, alternativu íbúðarmøguleikarnir í høvuðsstaðnum kunnu gerast ein álvarsligur trupulleiki fyri Havnina, tí fólk við lág og miðalinntøkum hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman, tá tey skulu seta seg í búgv, og noyðast tí at flyta úr høvuðsstaðnum at búgva og arbeiða. Tað metir Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag. Hon kennir nógv dømi um, at ungir, nýútbúnir lærarar hveppa seg við at seta búgv og søkja arbeiði í Havn, tí lønin samsvarar ikki við útreiðslurnar av einum sethúsum.

– Eg síggi tað ikki beinleiðis sum ein trupulleika fyri Føroya Lærarafelag, men heldur sum ein trupulleika hjá tí einstaka lærar-anum, sum virkuliga ynskir at vera lærari í Havn. Men størsti trupulleikin liggur tó hjá Tórshavnar Kommunu, tí gongdin kann enda við, at tað verður trot á lærarum í høvuðsstaðnum, greiðir Elsa Birgitta Petersen frá. Hon veit um fleiri dømi, at lærarar, sum helst høvdu ynskt at verið lærarar í Havn, kortini hava valt at flyta úr høvuðsstaðnum og fáa sær lærarastarv uttanfyri Havnina, tí húsaprísirnir eru so nógv lægri.

– Tað er jú líka gott at vera lærari, til dømis í Vestmanna, í Hósvík ella í Eysturoynni, eisini sjálvt um tú hevur tíni familjubond í Havn. Eg kenni fleiri dømi um ungar lærarar, sum kundu hugsað sær at verið lærarar í Havn, men sum kortini velja at búseta seg og fáa sær arbeiði úti um landið, tí tað er so nógv biligari, sigur Elsa Birgitta Petersen.

– Tað er ein gongd, sum vit kenna úr øðrum londum, men sum seinastu árini eisini sæst í Føroyum. Vit hav fleiri ferðir umrøtt trupulleikan, men vit fáa sum so ikki gjørt so nógv annað uttan at krevja meira løn undir sáttmálasamráðingum, sigur Elsa Birgitta Petersen. Eftir hennara tykki er tað ein trupulleiki hjá fleiri starvsbólkum, at so lítið samsvar er millum lønina og útreiðsluna til sethúsini, velir ein at seta seg í búgv í høvuðsstaðnum. Elsa Birgitta Petersen vísir á, at byrjunarlønin hjá einum lærara liggur um 19.000 krónur, og endalønin um 25.000. Og við hesi inntøku er trupult at forrenta eini sethús í høvuðsstaðnum. Læraralønin er at meta sum ein miðalinntøka í samfelagnum í dag, men fleiri starvsbólkar liggja undir hesa løn, leggur forkvinnan í Føroya Lærarafelag afturat.

Gunnleivur Dalsgaard er formaður í Starvsmannafelagnum. Hjá stórum parti av teimum tilsamans 1800 limunum í felagnum, harav 1100 starvast hjá tí almenna, er arbeiðsplássið í Havn. Eisini hann veit um fleiri limir, sum noyðast at búgva aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum. Orsøkirnar eru teir sera høgu sethúsaprísirnir í Havn, umframt at trupulleikar eru við barnaansing osv.

– Vit hava ikki viðgjørt teir høgu sethúsaprísirnar í høvuðsstaðnum sum eitt serstakt mál, og tað hevur heldur ikki verið uppá tal, eitt nú at differentiera lønirnar ella lønarkrøvini, tvs. at fólk í Havn eitt nú skulu hava meira løn enn aðrastaðni í landinum. Men tað er klárt, at tað er ein trupulleiki, at tað er so dýrt at seta seg í búgv her, sigur Gunnleivur Dalsgaard.

Hann leggur afturat, at gongdin í samfelagnum, og hvat tað kostar at liva, til eina og hvørja tíð kemur at vera grundarlagið undir lønarkrøvunum hjá Starvsmannafelagnum. Og so má man bara ásanna, at tað loypir meira av, velir tú at seta teg í búgv aðrastaðni enn í Havn.

Helvtarmunur

At stórur munur veruliga er á søluprísurin á sethúsum í høvuðsstaðnum og restina av landinum, prógvar eitt yvirlit hjá Føroya Sparikassa. Yvirlitið fevnir um allar sethúsasølur í landinum, undantikið tvingsilssølur og sølu av húsum, har seljari og keypari eru næstringar, og tískil hava avtalað ein prís sínamillum.

Sambært yvirlitinum skiftu 55 hús í høvuðsstaðnum eigara í fjør. Hesi hús vóru í meðal seld fyri 1,34 milliónir krónur. Sama ár vóru 59 hús seld í størru bygdunum í landinum, og á teimum var søluprísurin í miðal 716.000 krónur. Í smærru bygdunum vóru seld tilsamans 66 hús í fjør, og tey fóru fyri 631.000 krónur í meðal. Sostætt sæst, at húsini í høvuðsstaðnum í meðal vóru seld fyri útvíð tað dupulta sammett við húsini í størru bygdunum, og meira enn tað dupulta, sammett við smærru bygdirnar. Her skal tó havast í huga, at her er einans talan um sølukostnað, og hædd er tí ikki tikin fyri, hvussu húsini síggja út, hvussu stór og hvørjum standi tey eru í o.s.fr.

Men í Sosialinum í gjár mettu fleiri húsameklarar, at kostnaðurin á einum vanliga góðum sethúsum broytist 500.000 krónur, alt eftir hvørt húsini standa í Havn ella t.d. í Runavík. Og er talan um hús í Suðuroynni, er munurin á leið 700.000 krónur.

Yvirlitið hjá Sparikassanum vísir eisini, at sethúsaprísurin síðstu árini er nógv mest øktur í høvuðsstaðnum. Í 1999 var miðalsøluprísurin á húsum í Havn 1,08 milliónir krónur, í størru bygdunum var hann 664.000 krónur, og í smærru bygdunum 545.000 krónur.

Fyrsta hálvár í ár vísa tølini hjá Sparikassanum, at sethúsaprísurin í meðal framvegis er á veg uppeftir. Men sambært húsameklarum er miðalprísurin á sethúsum í Havn við at koma í eina fastari legu, og prísirnir eru ikki longur á veg uppeftir. Tó eru húsaprísirnir í restini av miðstaðarøkinum framvegis á veg uppeftir.



Stórur munur er á sethúsaprísunum í Havn, sammett við restina av landinum. Sum myndin vísir, eru sethúsaprísirnir øktir sera nógv í høvuðsstaðnum síðstu árini, meðan vøksturin ikki hevur verið so stórur kring landið. Tølini fyri 2002 fevna um fyrra hálvár

Kelda: Føroya Sparikassi.